# Kjak



**Árni Gregersen**
*ábyrgdarblaðstjóri*



**Katrin Erlendsdóttir**
*journalistur*

## Aftursvar til Firouz Gaini

Mánadagin framdi antropologurin og granskarin á Føroya Læraraskúla, Firouz Gaini eitt ógemeina ófantaligt og ósatt alment álop á Dimmalætting og journalistin, Katrin Erlendsdóttir í Sosialinum.

Orsøkin til skrópingarherðindi hjá skjarrliga granskaranum er tann, at Dimmalætting fríggjadagin í markleysum frekleika dittaði sær at sitera burtur úr eini longu almannakunngjørdari grein hjá honum í norska vísindatíðarritinum, BARN.

Í gravskitna álopinum í Sosialinum mánadagin pástendur granskarin, at allur hugsandi etikkur, øll basal sámiligheit og virðing – bæði fyri hansara gransking og honum persónliga - rætt og slætt eru traðkað undir fót. Av Dimmalætting. Tí Dimmalætting hevur dittað sær at sitera burtur úr eini grein hjá honum í norska BARN, uttan at hann persónliga sjálvur hevur valt út og vinklað og at enda vælsignað greinina.

Gaini hevur her púrasta misskilt uppgávuna hjá fjølmiðlum. Gaini má – eins og øll onnur – finna seg í, at vit hava frælsar fjølmiðlar. Avísini stendur púrasta frítt at sitera burtur úr hansara alment fíggjaðu granskingargreinum, men Gaini líkar ikki at missa kontroll. Hann vil og krevur og insisterar uppá annaðhvørt at sleppa at redigera innihaldið, ella verða bæði journalistur og avís svínað til alment, so eingin hereftir skal tora at nerta hansara forkunnugu gransking við eini eldtong.

Ikki við einum orði skrivar Gaini, hvørjar faktuellar feilir, avísin hevur gjørt seg seka í. Tí hetta er nevniliga als ikki orsøk til hvítgløðandi vreiðu hansara. Orsøkin er tíverri tann einfalda, at hann ikki finnir seg í, at vulgerir fjølmiðlar við greiðum vinklum og stuttum greinum dálka hansara drúgvu akademisku útreiðingar, soleiðis at vanlig fólk – almenningurin, sum rindar hansara løn – tímir at lesa.

At hetta er tristi veruleikin stendur greitt longu sunnumorgunin, áðrenn fólk flest hava fingið turkað svøvnin úr eygunum. Tá sendir hann nevniliga við heilsan frá "Fróðskaparsetur Føroya" øllum starvsfólkum á Dimmalætting persónligt langt teldubræv, har hann svínar blaðkvinnuna til og krevur at fáa at vita, hvørjar avleiðingar hendan stóra syndin skal hava fyri blaðkvinnuna. Hann sendir 63 – tríogtrýss! - teldubrøv avstað. 21 teldubrøv sendir Firouz Gaini avstað klokkan 7.54. 21 afturat klokkan 8.28 - og síðani, tá klokkan er blivin 8.43 henda halga sunnumorgun – trokast aftur 21 útspillandi teldubrøv frá Fróðskaparsetri Føroya seg saman í innbakkanum hjá starvsfólkunum á Dimmalætting.

Fyri at skera tað út í papp fyri lesarunum, so hevur Dimmalætting gjørt hetta mistakið: At avísin nakrantíð setti seg í samband við Firouz Gaini. Hetta var í roynd og veru óneyðugt, tí avísin jú hevur rætt til at sitera úr tí longu almannakunngjørdu greinini. Samstundis var hetta sum at rætta einum vissum lítlafingur – sum tey 63 skitnu teldubrøvini og líka so skitnað álopið í Sosialinum mánadagin prógvar. Hann fær tað eisini at ljóða, sum um einhvør kann krevja at sleppa at bestemma innihaldið í greinum, sum verða prentaðar í Dimmalætting. Soleiðis er ikki, um man eitur Gaini ella okkurt heilt annað. Tað er og verður rætturin hjá redaktiónini á Dimmalætting at viðgera, vinkla og formidla tilfar til lesarar okkara. Og tað fer Dimmalætting framhaldandi at gera, uttan mun til, hvussu alment fíggjaðir granskarar eymka og vena seg.



**Jónleif Johannesen**
*Samstarv.org*

## Dýrt verður dýrari

Búskaparráðið er komið við einari óheftari meting um føroyska búskapin. Ráðið vísir á, hvørja leið gangast kann, soleiðis at bygnaðarliga hallið verður burtur í 2015. Áhugavert er at lesa hesa frágreiðing og ikki minni áhugavert er at leggja tilmerkis, at tað ongastaðni í frágreiðingini verður roynt at vegleiða myndugleikarnar um, hvussu almennu lønarviðurskiftini eiga at verða framyvir.

Politikararnir siga, at tað als ikki er pláss fyri eini lønarhækkan, um bygnaðarliga hallið skal verða burtur í 2015. Hesum tekur búskaparmetingin frástøðu frá. Hinvegin sigur frágreiðingin, at málið kann náast í 2015, um inflatiónin heldur seg til uml. 2% árliga. At halda at inflatiónin verður lægri enn hetta er óveruligt. Hetta merkir, at føroyski lønmótakarin má, fyri at fáa sama virðið í lønarposan, hava ein lønarvøkstur á áleið 2% árliga. Annars fylgir lønmótakarin ikki við.

Lønin má hækka 2% um árið, skal virðið verða tað sama, men væntandi er hetta ikki nóg nógv. Lønarposin fer at gerst soltnari, tí størri hol verða klipt í bjølgin. Skattaskrúvan, sum er skrúvað í botn, og hækkandi avgjøldini gera, at holini í lønarposanum gerast alt størri. Posin lekur sum soldið.

Skal føroyski lønmóttakarin liva av tí, ið eftir er í útgataða lønarposanum, má útreiðsluneutraliteturin hjá teimum ráðandi finnast aðrastaðni enn hjá lønmótakaranum. Her má politikkur til. Loysnin er ikki at taka vunnin rættindi frá fakfeløgunum. Í Føroyum, her alt er ov dýrt fer at gerast enn dýrari at liva. Tí taki eg fult undir við almennu fakfeløgunum, tá ið tey siga: »Vit krevja nakað, og vit fáa nakað«.



**Sólvit Simonsen**

## 25 tingmenn - um pensjónsaldur

*Av góðum grundum havi eg nú tíð at lurta eftir tingfundum, og royni eg at lurta av og til, í hvussu so er*

Tað er óalmindiliga lítið álvara í fundinum, so vítt eg dugi at hoyra, so er tað serliga hjá teimum yngru fólkunum, hvussu man kann spenna bein fyri ein annan, og sjálvdan hevur tað nakað upp á seg. Oftast fáa tey klagurnar aftur í høvdið við ongum beskeð.

Tí er tað í eg ofta tonki um tað ikki hevði verið vert at minka tingmannatali niður í einar 25 tinglimir og sum helst skuldu ligið um pensiónsaldur, tá vóru fólk sum høvdu lívsroyndir, sum høvdu fari meira hóvliga fram og høvdu kunna fingið okkurt á skaftið.

Tey kanska høvdu funnið uppá okkurt sum kundi skaffað arbeiðspláss, tað skuldi ikki verið skeivt, um landið skapaði rammurnar. Tað er løgið at arbeiðsfólkið verður ikki tikið upp á tunguna. Ein verðsins skúladepilskal byggjast í Havn, tá verður stutt at renna út í Tinganes at biðja um stuðul og verða tey eisini væl mannaði at biðja um nógvan stuðul.

Tunnil vilja tit ikki byggja til Sandoynna, so má setast av til nýtt ferðamannaskip, og tað má blíva eitt væl størri skip, tí Teistin er alt ov lítil, og so aftur at byggja út í Skopun, so skipið sleppur inn har.

Men eitt gott er álíkavæl, sum væl verður lagt til merkis, og tað er at brúka Sandoynna til alistøð hjá fótbóltsspælaranum, tí hvørja ferð tað bragdar við góðum spælara, so eru pengamenn norðanfjørðs eftir honum. Eg veit ikki, hvussu tað er við skrivifrælsi, tí man fær ongantíð at vita, hvat í verður goldið fyri hvønn spælara.